Fylgiskjal 4

LM-106/2020

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 24. februar 2021
J.Nr.: 20/002846
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: ABD

Hoyringarnotat um

- **uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir,**
- **uppskot til løgtingslóg um at serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin) og**
- **uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde**

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendi tann 26. november 2020 uppskotini til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum og feløgum. Hoyringarfreist var tann 23. desember 2020.

Uppskotini vórðu send til hoyringar hjá hesum pørtum: Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Vinnuhúsinum, Felagnum Peningastovnar, Grannskoðaraeftirlitinum, Tryggingareftirlitinum og Fíggjarmálaráðnum. Uppskotið hevur eisini ligið frammi á heimasíðu Umhvørvis- og vinnumálaráðsins.

Hoyringarsvar komu frá:
- Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
- Januar, løggilt grannskoðanarvirki
- Numo, løggilt grannskoðanarvirki
- Spekt, løggilt grannskoðanarvirki
- Grannskoðaraeftirlitinum
- Tryggingareftirlitinum
- Eftirlønargrunni FA's

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Betri Trygging og Betri Pensjón boðaðu frá, at feløgini ongar viðmerkingar høvdu til uppskotini.

Viðmerkingar frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til hoyringarsvarini:

Felagið Føroyskir Grannskoðarar
Yvirskipað tekur felagið undir við, at lógin verður dagførd.

Til § 6 í uppskoti til løgtingslóg um at serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin)

Felagið vísir á, at skiftisreglurnar tykjast at vera munandi herdar í mun til líknandi skiftisreglur í Danmark. Felagið vísir eisini á, at einki verður nevnt um reglurnar um útboð í serligu viðmerkingunum til skiftisregluna á s. 21 í uppskotinum, og serligu ávirkanina, sum hetta kann hava á skiftistíðina.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Ætlanin hevur ongantíð verið at seta strangari skiftisreglur enn í ES í gildi í Føroyum, og tí er talan um ein feil, sum nú verður rættaður. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur rættað skiftisreglurnar um rotatión soleiðis, at skiftistíðin verður hin sama sum í ES. Eisini er í viðmerkingunum til skiftisreglurnar nágreinað, hvussu reglurnar skulu skiljast í mun til útboð.

Til § 1, nr. 73 (§ 41) í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir

Felagið vísir á, at tað ikki framgongur í uppskotinum, hvat orðið "leiðsluroyndir" frá PIE fyritøkum merkir.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur í viðmerkingini til § 41 í uppskotinum nágreinað, at leiðsluroyndir er at skilja sum stjórar, nevndarlimir, CFO, innanhýsis grannskoðanarleiðari el. líkn. í einari PIE-fyritøku.

Til § 1, nr. 81 og 84 (§ 42) í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir

Felagið ger vart við, at hægst bøturnar, sum kunnu verða álagdar grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, sambært uppskotinum nú verða tvífaldaðar. Verandi bøtur eru í mesta lagi 300 tkr. Til einstakar grannskoðarar og í mesta lagi 750 tkr. til grannskoðanarvirkir, og leggur uppskotið upp til, at tær nú verða ávikavist í mesta lagi 600 tkr. til einstakar grannskoðarar og 1,5 mio. til grannskoðanarvirkir. Felagið vísir á, at bøturnar í uppskotinum svara til tær í Danmark, ið eru ásettar útfrá viðurskiftunum í Danmark, har grannskoðanarvirkini hava eina heilt aðra støddd enn í Føroyum. Felagið heldur, at herðingin av bótunum kann føra við sær víðfevndar avleiðingar fyri grannskoðaravinnuna í Føroyum.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Við uppskotinum verður lagt upp til, at skipanin viðvíkjandi revsing verður broytt. Framyvir verður linari revsing í smáum málum og harðari revsing í málum um grov brot á grannskoðaralóggávuna.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at Grannskoðaraeftirlitið kann enda mál við einari átalu ella við einum boðum uttan, at málið verður lagt fyri Grannskoðaranevndina. Yvirskipað er talan um mál, sum koma fyri fyrstu ferð og higartil hava ført til bót upp á uml. 25.000 kr. Tað eru eftirlitsmyndugleikarnir, sum ítøkiliga meta um, nær talan er um smá mál og ikki.

Sambært uppskotinum verður galdandi støðið á bótum, sum í dag eru í mesta lagi 300.000 kr. til ein grannskoðara og 750.000 kr. til eitt grannskoðanarvirki, í útgangsstøði mett hóskandi, men mett verður, at tað í heilt serstøkum førum, har talan er um serliga grov brot á

grannskoðaralóggávuna, kann verða tørvur á at geva hægri bøtur. Tí verður skotið upp ein heimild til at hækka bøturnar upp í 600.000 kr. fyri ein grannskoðara og 1.500.000 kr. fyri eitt grannskoðanarvirki, tá talan er um serliga grov brot á skyldurnar sum grannskoðari. Væntað verður ikki, at ásetingin fer at verða nýtt ofta.

Í art. 30 b í ES-direktivi 2014/56/EU stendur, at tá bøtur verða álagdar skal hædd verða tikin fyri, hvussu grovt brotið er, fíggjarligu styrkini hjá tí kærda (við støði í umsetningi hjá virkinum ella ársinntøkuni hjá persóninum), tap ella vinning hjá tí innkærda av brotinum, endurtøku av brotum o.a. Harvið skal verða tikið hædd fyri fíggjarligu styrkini hjá grannskoðaranum ella grannskoðanarvirkinum, tá bót skal áleggjast. Nærri treytir, sum tær í ES-direktivinum, um ásetan av bótum, verða ásettar í kunngerð um Grannskoðaranevndina.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at revsiskipanin eftir uppskotinum skal síggjast í einari heild, har lagt verður upp til linari revsing fyri smærri brot og heimild til harðari revsing fyri serliga grov brot, og at hædd skal takast fyri m.a. fíggjarligu støðuni hjá innkærda, tá bót verður áløgd. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur tí ikki broytt ásetingarnar um revsing aftaná, at uppskotið hevur verið til hoyringar.

Leggjast skal afturat, at í fíggjarligu lóggávuni m.a. hvíttvasklóggávuni eru bøturnar hækkaðar eftir somu meginreglum, sum í hesum uppskoti.

Januar, løggilt grannskoðanarvirki, Numo, góðkent grannskoðanarvirki, og Spekt, løggildir grannskoðarar

Av tí, at nevndu grannskoðanarvirkir øll hava gjørt viðmerkingar til reglurnar um rotatión, verða viðmerkingarnar viðgjørdar undir einum.

Til reglurnar um firmarotatión

Grannskoðanarvirkið Januar tekur ikki undir við reglunum um firmarotatión, sum lagt verður upp til at seta í gildi, tí virkið metur, at føroyski marknaðurin er ov lítil til hesar reglur. Fyri at grannskoða fíggjarfyritøkur skal grannskoðarin hava eina serstaka góðkenning eftir lov om finansiel virksomhed, og til tað krevst m.a. eitt ávíst tímatal um árið innan grannskoðan av fíggjarfyritøkum. Av tí, at fíggjarfyritøkurnar eru fáar í Føroyum, verður tað trupult hjá grannskoðarum at varðveita serstøku góðkenningina, um rotatiónsreglurnar verða settar í gildi. Avleiðingin verður mett at verða, at tað aftaná eitt áramál við rotatiónsreglunum ikki fer at vera nakar grannskoðari eftir í Føroyum, sum lýkur krøvini til at vera grannskoðari hjá føroysku fíggjarstovnunum.

Fyri at fáa betri greiðu á spurninginum um ígildissetan av rotatiónsreglunum valdi Umhvørvis- og vinnumálaráðið at senda viðmerkingarnar frá grannskoðanarvirkinum Januar til hini grannskoðanarvirkini, sum eisini grannskoða PIE-fyritøkur, t.e.grannskoðanarvirkini Spekt og NUMO.

Hesi grannskoðanarvirkini vísa bæði á samfelagsliga týdningin av, at føroyskar PIE-fyritøkur hava møguleika fyri at velja ímillum ymiskar grannskoðanarfyritøkur, og verða rotatiónsreglurnar ikki settar í gildi, kann skjótt vera monopol innan grannskoðan av fíggjarfyritøkum í Føroyum. Spekt vísir á, at reglurnar um rotatión hava sum endamál at tryggja óheftni í sambandi við grannskoðan av fyritøkum av stórum samfelagsligum týdningi, og at føroysk frávik í reglunum kunnu hava týdning fyri roknskaparbrúkararnar, herundir íleggjarar á

keypsskálunum og møguliga fyri Fíggjareftirlitið. Spekt vísir á, at tað er rætt, sum Januar førir fram, at tað í dag er trupult hjá føroyskum grannskoðarum at lúka serstøku sertifiseringskrøvini til grannskoðarar, sum grannskoða peningastovnar, men hesir trupulleikar gerst ikki størri av rotatiónsreglunum. Avbjóðingin við sertifisering kundi verið loyst við at broytt kunngerðina um sertifisering.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Lóggáva í Føroyum á vinnufelagsøkinum er gjørd við støði í ES-reglum, og er lóggávan stútt og støðugt gjøgnum árini tillagað, so hon framhaldandi skal vera í samsvari við ES-reglur. Serliga hevur tað týdning fyri fíggjarfyritøku og børsskrásettar fyritøkur í Føroyum, at lóggávan verður dagførd og tillagað ES-reglum.

Rotatiónsreglurnar eru ásettar í artikli 16 og artikli 17 ES-fyriskipan nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014, sum skotið verður upp at seta í gildi í Føroyum, og eru reglur um rotatión eisini í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde.

Bakstøðið fyri rotatiónsreglunum og harvið í avmarkingunum viðvíkjandi valskeiði grannskoðarans er at styrkja grannskoðarans óheftni og økja kappingina á grannskoðaramarknaðinum.

Reglurnar um rotatión eru soleiðis skipaðar, at tað er krav um rotatión aftaná 10 ár, men møguleiki er fyri at leingja valskeiðið í mesta lagið til 20 ár, um tað verður framd ein útbjóðingarmannagongd viðvíkjandi lógarálagdari grannskoðan, ella 24 ár, um meira enn ein grannskoðari ella meira enn eitt grannskoðarafelag eftir endan á mest loyvda skeiðinum upp á 10 ár samstundis ger eina grannskoðnaruppgávu.

Møguleikin at leingja mesta loyvda valskeiðið við at velja ein grannskoðara aftrat kann hava við sær, at smærri grannskoðarafyritøkur í størri mun kunnu koma upp tal sum 2. grannskoðari. Tað kann eftirhondini viðvirka til, at fleiri grannskoðarafyritøkur kunnu grannskoða PIE- fyritøkur, og við tí kann tað mótvirka marknaðarkonsentratión.

Staðfestast kann, at grannskoðaravinnan ikki er á einum máli um, hvørt tað er rætt at seta rotatiónsreglurnar í gildi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur valt at halda fast um ásetingarnar um rotatión. Ráðið metir, at tað er umráðandi at hava somu reglur um óheftni, herundir um rotatión, fyri grannskoðan av fyritøkum av stórum samfelagsligum týdningi, sum londini rundan um okkum. Harafturat hevur tað samfelagsligan týdning, at tað eru fleiri veitarar á marknaðinum fyri grannskoðanartænastur til PIE-fyritøkur. Mett verður, at útlitini fyri at hava fleiri veitarar á marknaðinum verða minni, um ongar rotatiónreglur verða settar í gildi.

Til § 6 í uppskoti til løgtingslóg um at serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin)
Víst verður á, at skiftisreglurnar í uppskotinum viðvíkjandi rotatión eru styttri enn í ES. Mælt verður til, at reglurnar verða munandi longdar. Ein tvífalding verður mett hóskandi.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Ætlanin hevur ongantíð verið at seta strangari skiftisreglur enn í ES í gildi í Føroyum, og tí er talan um ein feil, sum nú verður rættaður. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur rættað skiftisreglurnar um rotatión soleiðis, at skiftistíðin verður hin sama sum í ES.

Grannskoðaraeftirlitið

Til § 1, nr. 5 í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
Grannskoðaraeftirlitið vísir á, at tað verður allýst í § 1a, stk. 1, nr. 1, hvat ein grannskoðari er. Í ásetingini verður víst til ávísar ásetingar í grannskoðaralógini, har skrásettur grannskoðari ikki stendur nevndur. Felagið mælir til, at ásetingin verður broytt, soleiðis at skrásettir grannskoðarar eisini verður nevndir í lógini ella í serligu viðmerkingunum.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Tað er rætt, sum Grannskoðaraeftirlitið vísir á, at grannskoðaralógin varð broytt í 2015 m.a. við tí endamáli at avtaka møguleikan at gerast skrásettur grannskoðari, og síðani 2018 hevur ikki verið møguleiki fyri at fara upp til prógvtøku at gerast skrásettur grannskoðari. Í § 2, stk. 2 í gildiskomu- og skiftisreglunum í løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015 um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir er ásett, at skrásettir grannskoðarar eru fevndir at § 1, stk. 4 í grannskoðaralógini, sum í galdandi lóg inniheldur allýsingina av einum grannskoðara. Ásetingin í § 1a, stk. 1, nr. 1 kemur í staðin fyri ásetingina í § 1, stk. 4 í galdandi lóg. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur rættað í serligu viðmerkingunum til § 1a, stk. 1, nr. 1 soleiðis, at tað nú framgongur í viðmerkingunum, at skrásettir grannskoðarar framvegis eru fevndir av hugtakinum "grannskoðari".

Til § 1, nr. 59 og 60 í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
Grannskoðaraeftirlitið vísir á, at samsýningin hjá limunum í nevndini er ov lág.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Einki er ásett í lógini um samsýning til limirnar, men er hetta nakað sum verður ásett aftaná góðkenning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum. Mett verður, at eitt mál um samsýning til limirnar er eitt mál, sum kann verða tikið upp millum partarnar óheft av hesum lógaruppskotinum.

Til viðmerkingar á s. 32 í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
Grannskoðaraeftirlitið vísir á, at ein setningur á s. 32 kann geva lesarunum eina skeiva fatan av, hvussu nógv mál hava verið til viðgerðar í Grannskoðaraeftirlitinum.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Teksturin er nú rættaður, so hann er meira í samsvari við veruliga virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

Tryggingareftirlitið

Til § 1, nr. 5 í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
Tryggingareftirlitið mælir til at tilvísingin í § 1a, stk. 1, nr. 3 verður broytt soleiðis, at tað í ásetingini heldur enn at verða víst til § 1 verður víst til 5, stk. 1, nr. 11 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Viðmerkingin er tikin til eftirtektar og ásetingin broytt samsvarandi.

Til § 1, nr. 5 í uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
Tryggingareftirlitið vísir á, at P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag ikki er fevnt av tryggingarlógini, men er skipað við serlóg – løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015. Sum ásetingin í § 1a, stk. 1, nr. 3 er orðað er P/F Lív ikki fevnt av allýsingini um feløg av almennum áhuga.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Av tí, at virksemið hjá P/F Lív svarar til annað virksemi, sum er fevnt av tryggingarlógini, og er fevnt av § 1a, stk. 1, nr. 3 í grannskoðaralógini, hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið valt at broyta ásetinginia í § 1a, stk. 1, nr. 3. Sambært ásetingini er tryggingarfelag sambært løgtinglóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensjónstryggingarfelag nú eisini fevnt av allýsingini av felagi av almennum áhuga (PIE).

Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags

Viðvíkjandi rotatiónsreglunum

Eftirlønargrunnurin mælir staðiliga frá, at reglur um rotatión verða settar í gildi í Føroyum, tí mett verður, at hetta fer at hava ringar avleiðingar fyri dygdina í grannskoðanini og ráðgevingini innan økið.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Víst verður til viðmerkingarnar hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til viðmerkingarnar frá Januar, Numo og Spekt.